# Dagrøktarbørnini hildu føstalávint



**Í gjár, føstalávintsmánadag, vóru umleið 200 dagrøktarbørn í badmintonhøllini. Tey slógu tunnu og fingu jólabollar og saft**

FØSTALÁVINT
*Ingrid Bjarnastein*

Ein rúgva av grýlukløddum børnum vóru í gjár, føstalávintsmánadag í badmintonhølllini og slógu tunnu. Tað vóru dagrøktarmammurnar í Tórshavnar Kommunu, sum vóru savnaðar at sláa tunnu saman við børnunum. Børnin sóu út til at stuttleika sær óført.

– Vit hava býtt børnini upp eftir aldri, og posarnir, ella tunnurnar, sum tey sláa eru so eisini passaðar til eftir teimum, sigur Annvør K. Niclasen, sum arbeiðir í Spælistovuni á Argjum, har dagrøktarmammurnar eisini halda til.

– Børnini hava gjørt maskur og hattar í spælistovuni. Nøkur av børnunum vóru pyntaði áðrenn tey komu her, og nøkur hava vit so málað og pyntað tá tey komu.

Annvør K. Niclasen sigur, at børnin hava glett seg ómetaliga nógv nú uppundir hetta føstalávintstiltakið. Tey hava enntá talt dagarnar.

– Vit høvdu eitt tílíkt tiltak í fjør, og vit vóru so væl nøgd við tað, at vit valdu at gera tað sama í ár, sigur Annvør K. Niclasen at enda.



*Umleið 200 dagrøktarbørn vóru samlað í badmintonhøllini føstalávintsmánadag*

*Myndir: Álvur Haraldsen*






†

Fríggjadagin 8. februar fór

**Jógvan Hansen**
í Havn, Gøtu Jógvan

heim til Harran, 84 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer týsdagin 12. februar kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Halldóra**

Tey, ið ynskja at minnast Jógvan, kunnu lata eina peningagávu til Akurin.




# Hevur tú hug at leiða hendan her - her..?



Sum nakað heilt nýtt letur heimskenda ketan Burger King sína fyrstu deild upp her í Føroyum og beint í hjartanum í høvuðsstaðnum - SMS. Ætlanin er at lata upp í september, og tí sambandi verður søkt eftir einum leiðara og trimum varaleiðarum at seta í starv, longu nú.
Tað vit bjóða er eitt spennandi framtíðarstarv við nógvum møguleikum í eini heimskendari fyritøku. Hetta er júst tað, sum tú altíð hevur droymt um...

**Leiðari:** Søkt verður eftir einum leiðara M/K at hava ábyrgdina av Burger King matstovuni og øllum starvsfólkunum, ið koma at starvast har. Ert tú yvir 20 ár, opin, virkin, røkin, sjálvstøðugur og tað, ið krevst, fyri at gerast ein góður leiðari, so ert tú kanska tann, vit leita eftir.
Og hevur tú fíggjarligan kunnleika, er tað bara ein fyrimunur.
At arbeiða málrætta og taka avgerðir, samstundis sum tú heldur fýra bóltum í luftini, er avgjørt tín styrki. Tú heldur, eins og vit, at tú og tíni starvsfólk skulu verða eitt vælleikandi lið, har tú ert liðskiparin.
Tú ert klár/ur at fara avstað, tá vit bjóða tær til Svøríkis í uml. 5 mánaðar at arbeiða og útbúgva teg hjá Burger King.
Sum leiðari í Burger King verður tú av og á eisini send/ur á skeið uttanlands fyri at menna teg og títt lið...

**Varaleiðarar:** Søkt verður eftir trimum varaleiðarum til Burger King matstovuna í SMS. Tey, ið sett verða, hava somu eginleikar, sum leiðarin sjálvur.
Starvið inniber eitt uppihald í Svøríki í uml. 3 mánaðar, har tú skal arbeiða og útbúgva teg hjá Burger King. Tú ert klár/ur at fara avstað, tí slíkar avbjóðingar eru júst nakað fyri teg....

*Sært tú teg sum leiðara ella varaleiðara, so send eina umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum til:*
***Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn***
***Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2002.***

BURGER KING

Burger King • SMS • Postboks 1059 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 30 41 • Fax 31 74 30

petur & petur • 320870